Nýggj veljarakanning:

# Javnaðarflokkurin størsti flokkur

**Javnaðarflokkurin styrkir sína støðu sum stjórnarflokkurin, meðan Sjálvstýrisflokkurin liggur á markinum fyri at detta úr løgtinginum. Hetta er úrslitið av nýggjari veljarakanning hjá Gallup Føroyar**

VELJARAKANNING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldi almannakunngjørdi Kringvarp Føroya í Degi og viku eina nýggja veljarakanning hjá Gallup Føroyar, sum styrkir um støðuna hjá sitandi samgongu.

Sambært kanningini ganga samgonguflokkarnir Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin fram, meðan Sambandsflokkurin missir nakað av undirtøku sammett við seinasta løgtingsval.

Løgmaður og formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard vísti í Degi og viku á, at fleiri kjarnumál hjá Javnaðaðarflokkinum hava fingið harða viðferð í vár, og tí var tað eitt sindur undrunarsamt, at flokkurin gekk so nógv fram í veljarakanningini.

Hann frøddist tí bæði um framgongdina hjá flokkinum, og um undirtøkuna hjá samgonguni, tí sum hann málbar seg, so ganga flokkar ofta aftur, sum stjórna einum landi.

### Tjóðveldið eisini framgongd

Størsti andstøðuflokkur, Tjóðveldisflokkurin, gongur eisini fram. Flokkurin fer úr 21,7 % til 23, 7 %. Hevði val verið nú var Tjóðveldisflokkurin næststørsti flokkur á tingi.

Verri stendur til hjá teimum báðum smáu andstøðuflokkunum, Miðflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum. Sammett við løgtingsvalið 20 januar í fjør fer Miðflokkurin úr 5,2% niður í 5,0 %, meðan Sjálvsstýrisflokkurin fer úr 4,6 % niður í 3,7 %.




**FAKTA**

| | Val 04 | Juli 05 |
|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 20,6% | 21,3% |
| Sambandsflokkurin | 23,7% | 23,1 % |
| Javnaðarflokkurin | 21,8% | 23,9% |
| Sjálvstýrisflokkurin | 4,6% | 3,7% |
| Tjóðveldisflokkurin | 21,7% | 23,7% |
| Miðflokkurin | 5,2% | 5,0% |

# – Brølararnir styrkja um støðuna

- Vit hava roynt at víst at eitt virki andstøðuarbeiði seinastu mánaðirnar, og hetta er ger óivað sítt til at vit ganga fram í veljarakanningini, Høgni Hoydal.

Nýggjasta veljarakanningin gevur Tjóðveldisflokkinum vind í seglini. Flokkurin fer sambært kanningini hjá Gallup Føroyum úr 21,7 % á seinasta løgtingsvalið til 23,7 %.

Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, sigur í stuttari viðmerking, at tað er altíð hugaligt at ganga fram í veljarakanningum.

- Landsstýrið hevur gjørt so nógvar brølarar seinastu mánaðirnar, at tað hevur verið lætt hjá okkum at gjørt traditionelt andstøðuarbeiði. Vit hava verið sjónligir, og víst okkara ónøgd við yvirtøkulógina, rækjustuðulin og vantandi raðfestingina á sosiala økinum, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal leggur afturat, at hann vónar, at Tjóðveldisflokkurin fær betri stundir í heyst at leggja síni egnu uppskot fram um loysnir á ymiskum málum, heldur enn bert at vísa sína ónøgd við framferðarháttin hjá sitandi samgongu.

Formaður Tjóðveldisfloksins vísir eisini á, at úrslitið av eini veljarakanningini avgjørt skal takast við fyrivarni. Hann sigur seg ongantíð hava havt veruligt álit á úrslitini á veljarakanningunum.

- Eftir mínum tykki eiga veljarakanningar at verða samanbornar við hvørja aðra, og ikki við val. Tá vit í Føroyum ikki gera veljarakanningar nóg regluliga hvørvur grundarlagið fyri at samanbera kanningarnar, og tískil vísa kanningarnar ikki ein veruleika, men meira ein tendens, heldur Høgni Hoydal.

**páll**

## Kringvarp Føroya søkir lærlingar til sjónvarpið

Søkt verur eftir tveimum lærlingum til útbúgvingina sum miðlatøknimekanikarar at byrja 1. september. Læran umfatar alt tekniskt arbeiði innan sjónvarp, m.a. upptøkur, redigering og viðlíkahald av útgerð. Útbúgvingin tekur 4½ ár. Av hesum eru 55 vikur skúlagongd í Danmark.

Førleikakrøv:

- "Grundforløbet teknologi og kommunikation inden for den kreative mediefamilie", á góðkendum skúla
- ella HH-, HF- ella studentsprógv.

Royndir við og áhugi fyri sjónvarpsmiðlinum eru fyrimunir. Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu sendast til:

Kringvarp Føroya
Norðara Ringvegi
Postboks 1299
110 Tórshavn
Merkt: MTM–lærlingar

Nærri upplýsingar kunnu fáast við venda sær til J. Herluf Sørensen – telefon 347742 – tpost: jhs@svf.fo.

Umsóknir skulu vera kringvarpinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. juli 2005, kl. 13.00. Umsøkjarar mugu vera tøkir til praktiska roynd leygardagin tann 23. juli.



# – Vit hava stabiliserað okkum

±- Eg gjørdist meira glaður enn keddur, tá eg sá úrslitið av kanningini.

Formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, heldur ikki tað er ein stórvegis trupulleiki, at Sambandsflokkurin framvegis gongur aftur í veljarakanningunum. Sambært nýggjastu veljarakanningini hjá Gallup Føroyar gongur Sambandsflokkurin - sum einasti samgonguflokkur - aftur. Flokkurin fer úr 23,7% á seinasta løgtingsvalið til 23,1 %

- Eg síggi fyrst og fremst úrslitið sum um, at vit hava stabiliserað okkum. Eg havi skeitt í hagtølini hjá Sambandsflokkinum frá 1970 til í dag, og síðan 1970 hava vit ligið millum 18 og 26 prosent av atkvøðunum. Við úrslitinum 23,1 % vil eg siga, at vit eru yvir miðal, og at vit hava stabiliserað okkum, heldur Kaj Leo Johannesen.

Formaður Sambandsfloksins leggur dent á, at úrslitið av eini veljarakanning altíð skal takast við fyrivarni, og at ein skal ansa eftir ikki at yvirtulka eina afturgongd á 0,6%.

### Tung málsøki

Sambært veljarakanningini ganga samgonguflokkarnar Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin fram, meðan Sambandsflokkurin aftur.

Spurdur um Sambandsflokkurin ikki hevur markerað seg nóg væl í samgonguni, svarar Kaj Leo Johannesen:

- Tað kann gott vera. Sambandsflokkurin hevur ongantíð verið ein flokkur sum hevur verið frambræsin. Okkara vørumerki hevur hinvegin verið stabilitetur og róð. Tú kanst heldur ikki siga, at Sambandsflokkurin umsitir mest umtóktu økini í landsstýrinum. Fíggjarmál og fiskivinnumál er ikki populerastu landsstýrissessirnir, tá niðurgangstíðir eru í Føroyum.

**páll**